# Seks gullmerki til ein svimjara

**Smáunglingameistarakappingin í svimjing varð leygardagin hildin í Vági**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

Kappingin var í Vági og luttóku øll svimjifeløgini, 111 svimjarar íalt.

Hetta er árliga meistarakappingin fyri Bólkarnar 1 og 2 (bólkur 1 er árg 95 og yngri, og bólkur 2 er árg 93 og 94).

Hetta vísti seg at blíva ein góð og spennandi kapping har fleiri svimjarar frá fleiri feløgum høvdu hug at blanda seg uppí tey fremstu.

### 6 gull til Hildur

Stóri vinnarin í bólki 2 gjørdist Hildur av Fløtti úr HS , Hildur vann ikki færri enn seks kappingar, 100m rygg, frí, firvald, blandað og 50m frí og firvald.

Ein annar svimjari í bólki 2 sum eisini rættuliga gjørdi um seg var Helena Strøm úr VS, Helena vann bæði 50m bringu og rygg og bleiv nr.2 í 100 rygg, 100 bringu og 100 blandað.

Fríkappingarnar í bólki 2 vann Heðin Olsen úr Reka og Magnus Jákupsson vann bæði 50m og 100m rygg, her høvdu Ingi Michelsen frá VS og Pól Mohr frá FS góðan hug at blandað seg uppí men máttu taka til takka við hvør sínum øðrum plássi.

Arni Gregersen frá Skeggjum vann bæði 50m og 100m bringu í bólki 2.

Aðrir vinnarar í bólki 2 vórðu: Torstein J. Fríðfinnsson úr Reka vann kappingina í 100 firvald, Dagmar Malena Winther úr HS vann 100 m bringu, Sasho Bjartsson úr HS vann kappingina 100 m blandað, Sasho var eisini svimjarin í bólki 2 í veruliga kittlaði eittarnar í bibburnar, hann var nr. 2 í 50 frí , firvald og 100 bringu. Benjamin Sikivat úr TS vann kappingina í 50 firvald, og kom inn á øðrum plássi í 50 m bringu og 100 m firvald og blandað.

Liðsvimjingarnar í bólki 2 vunnu HS og Reki.

### Bólkur 1

Í bólki 1 varð tað Poula Ø. Mohr úr FS, ið vann flest kappingar. Poula vann kappingarnar í 100 m blandað, og 50 m frí, firvald og rygg.

Svimjarin í Reka, Turid Christiansen gjørdi eisini um seg í bólki 1, hon vann kappingina í 50 m bringu og bleiv nr 2 bæði í 50 m frí, firvald og 100 m blandað.

Í bólki 1 vórðu fleiri sum vunnu hvør sína kapping, Jóhan Heðinsson úr FS vann kappingina í 50 m firvald, Hákun Edmundsson úr Flot vann kappingina í 50 m bringu, Tróndur J. á Høvdanum úr Skeggjum vann 50 m frí og svimjarin úr Ægir Alvi Mikkelsen vann kappingina 50 m rygg, og kom inn á øðrum plássi bæði í 50 m bringu og frí. Ólavur Fjørdal úr TS vann 100 m blandað.

Gentirnar úr FS vunnu liðsvimjingina í bólki 1 4x50 m frí.



*Allir svimjararnir, ið luttóku í kappingini í Vági í vikuskiftinum, eru her avmyndaðir í svimjihøllini í Vági*
*Savnsmynd*

### Væleydnað tiltak

Kl 20:00 um kvøldið var lítil samkoma í Auluni í Vágs Skúla har vinnandi svimjararnir fingu heiðursmerkir.

Sera áhugavert at síggja eina stúgvandi fulla høll av svimjararum, og ikki minst øllum foreldrum sum vórðu komin at heiðra børnunum.

Eisini landsliðsvenjarin Petur Heðin á Fløtti var á staðnum og undirhelt eina løtu við onkrum spæli, varð annars frásøgumaður í svimjihøllina alla kappingina, og kom hann sera væl frá hesum, so sigast kann at hann dugir annað enn at taka tíð og læra svimjararnar at svimja skjótt.

Næsta kapping er UM – Unglingameistarakappingin, hon verður í Klaksvík í døgunum 7., 8. og 9. mai.

**Samlaða býtið av heiðursmerkjum í Vági var annars hetta:**

| | felag | gull | silvur | bronsa |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Svimjifelag | 12 | 8 | 7 |
| 2 | Reki | 6 | 4 | 5 |
| 3 | Fuglafjarðar Svimjifelag | 6 | 2 | 7 |
| 4 | Skeggjar | 3 | 8 | 1 |
| 5 | Vágs Svimjifelag | 2 | 4 | 1 |
| 6 | Tvøroyrar Svimjifelag | 2 | 3 | 5 |
| 7 | Ægir | 1 | 2 | 0 |
| 8 | Flot | 1 | 1 | 3 |

# Tveir føroyskir fótbóltsleikarar venja við AAB

**Í løtuni eru tveir føroyskir fótbóltsspælarar á vitjan í danska superligafelagnum AAB í Álborg, har teir eru bodnir til venjingar næstu dagarnar**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Teir báðir, Símun Samuelsen úr VB og Andrias Lava Olsen úr LÍF, eru bjóðaðir til Álborg av danska felagnum, sum fegin vil síggja teir undir venjing. Teri venja við teimum yngru leikarunum hjá AAB, men høvið verður eisini hjá teimum at venja við superligahópinum hjá AAB.

### Spæla á eykaliðnum

AAB hevur undan kappingarbyrjan í Danmark í vár fingið nýggjan venjara, svían Erik Hamren, og teir báðir føroyingarnir fáa høvi til at venja undir navnframa svianum. Komandi týsdag fáa Símun og Andrias eisini høvi til at royna seg í dysti, tá ið teir skulu leika við eykaliðnum hjá AAB, sum skal spæla dyst móti eykaliðnum hjá superligafelagnum FC Midtjylland. Vanligt er í Danmark, at tað er ein blanding av ungum, evnaríkum leikarum og so meiri royndum leikarum, ið kanska eru við at koma fyri seg eftir skaða, í leika á eykaliðnum hjá superligafeløgunum.



*Ungi vágbingurin, Símun Samuelsen, er sjálvur annar í løtuni í Álborg, har hann venur við danska superligafelagnum AAB*
*Savnsmynd*



# Einki flytingarvindeyga

**Føroysku fótbóltsfeløgini hildu ikki, at uppskotið um møguligt flytingarvindeygu var búgvið til støðutakan**

FSF-FUNDUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sonevndu flytingarvindeyguni vóru seinsata heyst sett í gildi í alheims fótbóltsheiminum, men enn eru føroyingar so ikki vorðnir partur av hesum.

Nevndin hjá FSF hevði annars eitt uppskot um flytingarvindeyga til aðalfundin. Uppskotið varð í fyrstu syftu tikið aftur av nevndini, men á eykaaðalfundinum varð tað lagt framaftur.

Við tað at uppskotið fyrst varð tikið aftur, skuldi tó ein atkvøðugreiðsla til, har feløgini skuldu gera av, hvørt uppskotið yvirhøvur skuldi viðgerast, og hetta helt ein breiður meiriluti av feløgunum.

Tað var tó ikki soleiðis, at feløgini vóru so øgiliga nøgv fyri uppskotinum. Serliga tí tvinnir trupulleikar tóktust gera seg galdandi.

FSF hevði í sínum uppskoti ásett, at flytingarvindeyguni skuldu vera frá kappingarloki og átta vikur fram, og so í summarsteðginum, men serliga hetta fyrra hildu flestu feløgini vera alt ov lítið. Tað krevur í øllum førum, at feløgini skulu hava leikarahópir sínar upp á pláss innan jólini, og tað fall ikki í so góða jørð.

Hin trupulleikin tóktist vera, at uppskotið hjá FSF fevndi um allar vaksnamannadeildir og um bæði sáttmála- og áhugaleikarar. Her hildu feløgini, at tað átti at borið til at snikkað eitt serføroyskt uppskot til, soleiðis at atlit verða tikin til, at vit ikki hava veruligan yrkisfótbólt her heima.

Lítið konkret kom fram í so máta, men tað skiltist tó millum reglurnar, at flestu feløgini helst vildu hava, at eitt slíkt uppskot bert kom at fevna um sáttmálaleikarar í teimum báðum ovastu mansdeildunum. Og at glaðu amatørarnir soleiðis ikki skuldu verða læstir inni í eini stirvnari skipan.

Eingin niðurstøða varð gjørd um málið, sum FSF-nevndin at enda tók aftur, men tað tóktist tó vera ein breið semja um, at feløgini og FSF í felag fara at arbeiða víðari við málinum, soleiðis at ein loysn kann finnast. Kanska til komandi aðalfundin.

# Taktiskt nevndarval

**Tað tóktist vera ein bein linja millum formansvalið og atkvøðugreiðsluna á nevndarvalinum annars, tá FSF hevði aðalfund leygardagin**

FSF-NEVNDIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umframt formansvalið, sum varð umrøtt í blaðnum í gjár, so var nevndarval eisini á skránni, tá FSF hevði aðalfund leygardagin.

Fyri vali stóðu Rúni Heinesen, Karl Vidtfeldt og Christian Andreasen, og av hesum hevði Christian Andreasen borið seg undan afturvali. Hartil var sessurin hjá Óla Holm leysur, eftir at hann nú var vorðin formaður, og soleiðis skuldu fýra nevndarlimir veljast.

Hesir skuldu finnast millum teir fimm, Per Hansen, Rúni Heinesen, Bjarki Mohr, Magnus á Stongum og Karl Vidtfeldt, og samtykti fundurin, at teir tríggir fyrstvaldu skuldu veljast fyri tvey ár, meðan tann fjórðvaldi skuldi taka seinasta árið av skeiðnum hjá Óla Holm.

### Taktist spæl

Og tað stóð skjótt greitt, at nakað av taktiskari telving var farin fram undan valinum. Tað hevði annars ljóðað í krókunum, at fleiri av feløgunum høvdu ætlað sær at stemmað Karl Vidtfeldt úr nevndini, men støðutakanin hjá B36 í formansvalinum broytti helst hetta.

B36 var nevnliga eitt av feløgunum, sum skeyt Christian Andreasen upp til formansevni, og uttan at slíkar avtalur á nakran hátt kunnu staðfestast, so merkti hetta helst, at felagið samstundis misti fleiri møguligar atkvøður fyri sínum valevni til nevndarvalið.

Og um nakað, so gjørdist hetta enn sjónligari, tá atkvøðurnar vórðu taldar upp. Tað gjørdust nevnliga Bjarki Mohr og Magnus á Stongum, sum fingu flestu atkvøðurnar, meðan hinir tríggir so máttu berjast um teir báðar seinastu sessirnar. Per, Rúni og Karl umboða ávíkavist B36, KÍ og B71, og júst hesi vóru millum teirra, sum høvdu Christian Andreasen í uppskoti.

Endaliga úrslitið varð, at Rúni og Karl fingu 17 atkvøður hvør, meðan Per fekk 13, og soleiðis ikki varð valdur í nevndina.

Tiltakslimir skuldu tó eisini finnast, og her varð Per Hansen annað av uppskotunum, meðan Mortan Poulsen eisini varð skotin upp, og teir báðir vórðu so valdir í hesar sessirnar uttan atkvøðugreiðslu.

Sostatt er nýggja nevndin í FSF mannað soleiðis: Óli Holm, formaður, Niklas á Líðarenda, næstformaður, Jens Erik Magnussen, Rúni Heinesen, Bjarki Mohr, Magnus á Stongum og Karl Vidtfeldt.



*Bjarki Mohr er ein av nývaldu nevndarlimunum í FSF. Hann er ættaður av Sandi, men hevur í mong ár búð í Havn og hevur spælt fótbólt við B71 og HB*
*Savnsmynd*

# Børge varð heiðraður

**Børge B. Hansen fekk á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum serstaka gávu fyri virksemi sítt innan fótbóltin**

HEIÐURSGÁVA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinasti parturin av aðalfundinum hjá FSF var á skránni leygardagin.

Umframt formligu viðurskiftini, har serliga nevndarvalið var samrøðu evnið, hevði nevndin eisini gjørt av at sýna einum fyrrverandi nevndarlimi ein serliga heiður.

Børge B. Hansen var partur av FSF nevndini frá fyrsta degnum og fram til aðalfundin í fjør, tá hann í seinastu løtu trekti seg, heldur enn at fara í stríðsval ímóti Niklas á Líðarenda um næstformanspostin.

Tí fekk FSF ikki heiðrað honum ta ferðina, men á aðalfundinum hesaferð kundi fráfarandi formaðuri so biðja Børge koma upp eftir eini sømdargávu frá FSF.

Gávan var ein málningur, og løgvabrestirnir vóru nógvir og hvøllir, tá Børge kom upp at taka ímóti málninginum, sum hann nú kann hanga upp á veggin heima í stovuni.



*Dánjal Andreasen handar Børge B. Hansen gávuna fyri trúgva og drúgva tænastu. Fyri trúgva og drúgva tænastu gjøgnum millum annað 24 ár í FSF-nevndini fekk Børge B. Hansen ein málning frá FSF*
*Mynd: Álvur Haraldsen*